# Spilt spælidós

Eg drakk te í morgun. Áðrenn eg var ordiliga vaknað. Eg fylti ketilin, hóast eg visti, at eg bara skuldi brúka uppí ein kopp. Mint-te við sitróngrasi. Tað smakkar av mold, so eg plagi at koyra hunang í. Eg brúkti ein knív at skava við, tí ein teskeið hevði ikki passað í. Tá ið eg hevði brent meg av tí kókaða vatninum minst tríggjar ferðir, setti eg meg við køksborðið. Nú siti eg her og drekki. Krússið er heitt. For heitt. Uttanfyri er sólin eisini vaknað. Hon hevur sovið leingi. So leingi, at eg næstan hevði gloymt hana. Nú skínur hon á húsini í bygdini. Vindeyguni lýsa. Tey heilsa sólini góðan morgun. Sólin skínur, men tað er ikki heitt. Tvørturímóti. Hon minnir meg á, hvussu kalt tað í veruleikanum er. Útvarpið er sløkt. Eg orki ikki at tendra tað. Tað er friðarligt inni. Úti hoyrist bara skrellibilurin. Enn havi eg ikki smakkað teið, tí tað er enn ov heitt. Mær dámar ikki ljósar morgnar. Eg kenni meg nakna. Skitna. Seka. Dagurin bjóðar mær allar møguleikar og aftur í dag, takki eg nei. Tað er kalt í køkinum og eg havi gásarhold. Mín David Bowie t-shirt er ikki longur líka heit, sum hon var undir dýnuni. Kanska átti eg at latið meg betur í. Troyggjan, sum eg fekk í jólagávu frá ommu, hongur á stólinum. Hon bíðar eftir mær har. Eg lati meg ikki í hana, men tað er gott at vita, at hon bíðar. Eg haldi, at tað er okkurt uggandi við at vera køld. Nú er teið klárt at drekka. Eg súpi eitt sindur av tenum, og stoyti restina í vaskið. Eg seti meg á stólin við skriviborðið inni í kamarinum. Tað eina beinið á stólinum er

brotnað, so hann ruggar tá man setir seg. Á skriviborðinum stendur spælidósin við ballettdansarinnuni. Eg fekk hana frá mammu, tá eg fylti átta. Úr dósini ljóðar eitt lag. Lagið er ikki sum tað plagdi at vera. Nú er lagið óhugnaligt. Útgingið. Brúkt. Ella kanska meira syrgiligt. Melankolskt og nostalgiskt. Eg eri eins og spælidósin, útgingin. Eg eri ikki tað, eg havi verið. Eg broyttist tað kvøldið. Tað kvøldið, tá hann tók alt tað, eg helt var mítt. Hann tók mín kropp tá, og hann hevur átt hann líka síðani. Eg síggi enn eyguni fyri mær. Hóttandi og óð. Næstan sum skuldi hann hevna seg inn á meg. Sum hevði eg gjørt nakað so ræðuligt, at nú skuldi eg gjalda fyri tað. Hansara tungi andadráttur luktaði av sigarettum og øl. Hann helt mær niðri á songini. Madrassan tók ímóti mær, sum hevði hon verið brúkt til hetta fyrr. Eg var eins og ein dukka, brúkt. Eg skríggjaði ikki. Hví skríggjaði eg ikki? Tað kendist sum druknaði eg. Líkamikið hvussu nógv eg stríddist, so fekk eg ikki orðið fram. Hann var sterkari og eldri enn eg. Eg minnist ikki hvussu eg endaði har. Kanska vil eg ikki minnast. Tá tað endiliga var liðugt, reistist hann og dró buksurnar upp aftur, sum hevði hann bert bundið lissurnar.

Hansara køldu hendur eru eftir á mær. Bláu merkini eru vekk nú, men eg føli tey enn. Tey eru sum tatoverað á mær. Á rygginum. Á búkinum. Um handliðirnar. Tá eg fari í brúsu, hyggi eg niður í gólvið, fyri ikki av óvart at síggja mína spegilsmynd, tí eg kenni hana ikki longur. Skjótt verður tað ringt at krógva prógvið. Eg passi ikki longur mínar Calvin Klein cowboybuksur. Hvussu gloymi eg hann, tá ið ein partur av honum livir inni í mær? Tað er ein áhaldandi áminning

um hann. Um tað, hann tók frá mær. Eg fortaldi tað ikki fyri nøkrum, tí hann segði, at eingin fór at trúgva mær. Fyrradagin møtti eg honum og damuni í Miklagarði. Hon heilsaði. Eg heilsaði aftur. Hann hugdi niður í gólv, og læt sum hann ikki sá meg. Eg kenni damuni hjá honum. Vit gingu í fólkaskúla saman. Hon hevur altíð verið blíð við øll. Tað er tað, sum eg ikki skilji. Hví hon er endað saman við honum. Eg havi spælt mær við tankan nakrar ferðir. Um eg skal fortelja henni ella ikki. Enn havi eg einki sagt, og tað fari eg allarhelst ikki. Eg ætlaði mær ikki at hava tað. "Barnið". Tað følist snedigt at siga. Búkurin er vaksin nógv síðstu vikurnar, og eg síggi ikki longur niður á nalvan. Í fyrstani var eg avgjørd um, at eg skuldi ikki hava tað. Eg havi verið hjá læknanum heilar fýra ferðir. Fyrst bara fyri at ásanna, at eg veruliga var við barni. Eftir tað, forkláraði eg, at eg vildi hava eina fosturtøku, men tá hugdi læknin metandi at mær og segði einki. Honum nýttist ikki siga nakað, tí eg visti longu, hvat hann hugsaði. Eg spurdi, um tað var møguleiki fyri tí í Føroyum. Hann svaraði nei. Eg hevði ikki ráð at fara til Danmarkar, og eg tordi ikki at fara einsamøll. Dagarnir gjørdust til vikur, og áðrenn eg visti av tí, vóru morgnarnir merktir av vamli og klíggjan. Eg havi altíð ætlað mær av landinum at lisið eftir miðnámstíðina, men tað verður nakað verri nú. Eg ætli mær at siga mammu tað í kvøld. Hon verður ikki blíð. Tað veit eg longu. Eg eri ikki gift. Eg havi ikki so frægt sum ein sjeik. Búkurin er rundur undir blusuni, men hann er ikki partur av mær. Hann er fremmandur. Eg haldi um búkin og tori ikki at hugsa um eyguni. Eg hopi ikki, tað hevur hansara eygu.

Eg hvørvi, so hvørt sum búkurin veksur...